# ur



*Janus M. Joensen var fleiri ferðir um ein háls av kvika Bergi Midjord, men hóast hetta, so fekk B36 ikki skapt sær neyðugu møguleikarnar at avgera dystin. Og so var um reppið, at HB í yvirtíðini fór avsatð við øllum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

hótti við at skræða vinstru síðu av HB-verjuni upp.

Serliga seinasta hálva tíman royndi HB at gardera seg við at halda nógv fólk aftan fyri bóltin. Tað var rár hending, at færri enn fimm HB leikarar vórðu standandi eftir í verjuni, tá teir reyð/svørtu leitaðu niðan eftir vøllinum.

Ætlanin var helst, at B36 í royndunum at skora skuldi flyta nógv fólk niðan í álopið, og tó at hvítu grannarnir ongantið satsaðu alt frameftir, so var tvær ferðir um reppið, at HB fekk skotið avgerandi málið. Fyrru ferðina tá Tór-Ingar rak einar 60 metrar við bóltin, áðrenn hann langaði bóltin framvið handara stólpa, og so kundi Jákup á Borg í 92. minutti avgjørt dystin, tá hann brádliga stóð púra leysur. Men flata skotið fór framvið nærmara stólpa, og so spurdist heldur einki burtur úr teirri royndini.

## Trupulleikar í vinstru

Skal takast samanum dystin, so gav hesin helst greiðar ábendingar um, at B36 í løtuni er betra boðið upp á ein komandi meistara, um hetta bara skal avgerast millum havnarliðini.

Fyrst og fremst, so tóktist B36 í nógvar mátar at hava meira at bjóða upp á enn HB hendan dagin. Teir megnaðu at spæla meira varierað, teir vóru meira sannførandi í verjupartinum, og onkursvegna var eisini meira drive í árstalsfelagnum.

Hjá HB var tað fyrst og fremst verjuparturin, sum røkti sínar skyldur, og tó at hetta altíð er ein dygd, so er hetta ein partur av spælinum, sum als ikki hevur fungerað optimalt í ár. Nakað sum 12 »baklæns mál, segði norðmaðurin« í 9 dystum eisini bera boð um.

Men hartil, so hevur felagið eisini ein trupulleika í uppbyggjandi spælinum, har tað mest sum einvíst hevur verið spælt niðan í høgru. Ymsir møguleikar hava verið royndir í vinstra borði, og hesaferð varð Vagnur Mohr Mortensen so royndur á plássinum. Men fyri tað fyrsta er hann enn ikki í nóg góðar dystarvenjing, og í øðrum lagi er hann als ikki nakar kantspælari, og tí var tað tiltrongt, tá Flóvin Jespersen loysti hann av á hesum plássi.

Enn er tó alt í verðini ov tíðliga at taka nakað frá HB, tá tosast skal um FM-møguleikar. Enn eru bert tvey stig, sum skilja B36 frá hinum, og trý meistaraheitið á rað tala væl eisini sítt greiða mál um, at teir reyð/svørtu eru nóg drúgvir til at halda ferðini uppi í eitt langt og drúgt kappingarár.

## Effektiva havnarliðið

Hjá B36 hava úrslitini í øllum førum higartil verið somikið góð, at liðið er á odda, og bara hetta í sjálvum sær er eisini nóg mikið til at seta liðið sum – í løtuni – fremsta FM-favorittin.

Í mun til eitt nú 1997 og 2001, tá B36 vóru meistarar, so er tað tó ikki spruttandi álopsfótbólturin, sum hevur verið vørumerkið hjá liðnum higartil í ár. Hinvegin eru 18 stig sum úrslit av 12 málum í níggju dystum eitt sjáldsamt úttrykk fyri effektivet og tætt verjuspæl, tó at nøkur framúr avrik frá landsliðsmálverjanum helst eisini káva útyvir nakað av hesum seinasta.

Kanska týdningarmest, so hevur liðið - sum úrslit av einum vaksandi sjálvsálitið - eisini havt tol til at halda fast í spælkonseptinum, har verjan sjáldan selur seg, men har álopini ístaðin verða bygd upp við longum sendingum niðan á framherjarnar. Trupulleikin í hesum er tó, at tað tá kann gerast sera strævið at opna verjur, sum leggja seg aftur at bíða, og hjá einum liði, sum er frammi í oddinum, verður talan heilt víst um fleiri dystir av tí slagnum.

### Fakta um dystin

**B36-HB 0-0**

Dómari: Páll Augustinussen. Ikki altíð líka lætt at fylgja linjuni, men hevði fyri tað tað mesta gott tamarhald á.

B36: Jákup Mikkelsen – Kenneth Jacobsen, Herbert í Lon Jacobsen, Fróði Benjaminsen, Alex dos Santos – Bergur Midjord (Leiv Hanssen, 70.), Ingi Højsted (Klæmint Matras, 74.), Mikkjal Thomassen, Eyðun Højgaard (Borgi Hermansen, 74.) – Allan Mørkøre, Obele Okeke Onyebuchi

GK: Mikkjal Thomassen, 9., Alex dos Santos 37., Ingi Højsted, 67.

HB: Bárður Johannesen – Hallur Danielsen, Jóhannis Joensen, Rasmus Nolsøe, Janus M. Joensen – Jákup á Borg, Rúni Nolsøe, Kári Nielsen, Vagnur Mohr Mortensen (Rókur F. Jespersen, 61.) – Heine Fernandez (Hans á Lag, 85.), Tór-Ingar Akselsen

GK: Janus M. Joensen, 55.

# Dystarskráin merkist



*Heine Fernandez var ikki heilt nøgdur um spælið hjá sær og sínum monnum eftir dystin mánadagin*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

Hóast hann kanska kundi vera nøgdur um úrslitið, so var Heine Fernandez ikki heilt nøgdur um avrikið hjá sínum monnum, tá vit fingu orð á hann eftir dystin móti B36 sunnudagin.

- Serliga í fyrra hálvleiki gongur illa hjá okkum. Vit royna at fáa vindin »í okkara part«, men hetta makta vit yvir høvur ikki, og tí eru vit støðugt undir einum stórum trýsti. Hinvegin skal B36 eisini hava rós, tí teir spæla ein góðan dyst, men eg haldi sjálvur, at teir koma ikki fram til nakrar stórvegis møguleikar. Har eru tað kanska vit, sum hava teir báðar størstu, men tað eydnast okkum so ikki at skora upp á hesar.

Tit hava sum so fatur á rætta endanum seinasta hálva tíman, har tit hava fleiri kontramøguleikar. Var tað hetta spælið, sum tit vildu hava fram alla tíðina.

- Partvíst. Men sum heild fáa vit betri tak á eftir steðgin, og hevði tað eydnast okkum at skora, so vildi tað verið heilt gott.

Sjálvur hevur Fernandez nú nakrar dystir á baki, eftir at hann annars byrjaði árið á skaðalistanum. Enn er skaðin tó ikki heilt burturi, og eftir dystin helt Heine eisini, at hann kanska skuldi sitið yvir hesaferð.

- Tað er so sjálvandi ein avgerð, sum verður tikin frá dysti til dyst, men hesa ferð var hon kanska skeiv, helt hann.

## Strævin skrá

Nú fyrsti triðingurin er farin aftur um bak, kundi HB-venjarin hóskandi eisini líta eitt sindur aftur um bak, og hóast alt, so sær støðan hjá HB ikki heilt býtt út. Bara tvey stig eru upp til oddin, og enn eru 18 dystir at spæla, og tað fyrsta, sum Heine staðfesti, var, at enn er langur vegur eftir.

- Alt er púrasta opið enn. Men hesar báðar seinastu vikurnar hava verið sera strævnar hjá okkum. Við fýra dystum innan 12 dagar eru spælararnir av álvara farnir at slítast, og eg haldi eisini, at tað er eitt sindur spell, at tann seinasti av hesum dystunum skal vera ein slíkur oddadystur. Tað haldi eg merkti dystin, ið ikki gjørdist eins góður, sum hann kundi verið, segði Heine at enda.

-jm